

Valhall.

# Óttast samanstoyt: Flyta burtur øll frá oljuøkjunum Valhall og Ekofisk

**Jógvan Hugo Gardar**

31.12.2015 - 11:54

Oljan.fo

Fyri løtu síðani gav bjargingarleiðslan boð um at tøma oljupallarnar á Ekofisk og Valhall í Norðsjónum fyri fólk. Samstundis eru oljupumpurnar skrúvaðar fyri. Framleiðslan er steðgað og tey seinastu starvsfólkini á hesum báðum oljuøkjunum verða nú flutt burtur við tyrlum.

LES EISINI: Leysur prámur hótti oljuøki

Taðvar í gjárkvøldið, at boðini komu um, at ein stórur prámur hevði slitið seg leysan, og rak við kós móti Valhall-økinum, sum er tað sunnasta í norskum sjóøki í Norðsjónum. Talan er

um yvir hundrað metra langa og 30 metra breiða prámin ”Eide Barge 33”. Hann er ómannaður, og Eide Marine eigur.

Tíðliga í morgun hevði prámur skift kós eitt vet, og ferðin var minkað. Men um hálvgum ellivitíðina føroyska tíð vísti tað seg at prámurin nú hevur beina kós móti Valhall, og ferðin er økt. Tað er ófantaligt veður á leiðini og nógvur vindur.

Í gjár blivu 150 av 235 starvsfólkum flutt yvir á aðrar pallar í Norðsjónum. Nú verða tey um 70 sum vóru verandi umborð eisini flutt fr\a Valhall og Ekofisk.

Prámurin er um 13 fjórðingar frá Valhall-økinum, og við tí ferðini hann hevur í løtuni, so kann hann koma til Valhall um tríggjar-fýra tímar.